## Svimjivinir fingu »vinarbreyð«

Nýggi løgmaður er fastur gestur í svimjihøllini í Gundadali. So har fingu allir gestirnir wienarbreyð í morgun. - Hetta er “vinarbreyð”, sum ein av svimjivinum løgmans glaður tók til.



# fólk



*Nýggi løgmaðurin, Kaj Leo Johannesen, fær muss og klemm frá konuni, Jórunn*



*Ikki untist pápa Kaj Leo, Leo Hans Johannesen, at uppliva sonin gerast løgmann. Men mamman, Karin Holm Johannesen, var stolt av soninum í morgun*



*Sum væntað gjørdist Annika Olsen nýggjur innlendismálaráðharri*

so krevur tað ein nýggjan post til John Johannesen.

Men sum John Johannesen sjálvur vísir á, so er tíðin við at renna út, og ein avgerð má finnast.

Tað, sum so stendur fast higartil er, at Kaj Leo Johannesen longu hevur tikið við sum løgmaður, Johan Dahl verður vinnumálaráðharri, Rósa Samuelsen verður almannamálaráðharri, Jørgen Niclasen verður uttanríkismálaráðharri, Jacob Vestergaard fiski- og tilfeingismálaráðharri og Annika Olsen innlendismálaráðharri.

Leggjast kann aftrat, at við í telvingina hjá Fólkaflokkinum hoyrir, at tað verður Jákup Mikkelsen, sum verður nýggjur formaður á tingi hjá Fólkaflokkinum.

### Verða savnandi

- Tað kendist ótrúliga gott!

Soleiðis svaraði Kaj Leo Johannesen, løgmaður, tá Rás2 spurdi hann, hvussu tað kendist at halda sína fyrstu røðu sum løgmaður.

Hann segði, at tað týdningarmesta fyri hann fór at verða at virka sum savnandi liður í landsstýrisarbeiðinum, og at hann fór at gera alt fyri at samstarvið millum flokkarnar fór at gerast av tí besta.

Hann nevndi í sínari setanarrøðu, at hann elskar Føroyar, og at hetta landið, sum hann elskar bæði tekur tey, man hevur kær, men eisini gevur onnur, sum man elskar yvir alt.

Tað er jú eingin loyna, at havið tók pápa hansara, Leo Hans Johannesen, í druknivanlukku við Mykines fyrst í 90-unum. Kaj Leo Johannesen smæðist ikki fyri at kalla pápa sín fyri sína størstu fyrimynd. Hann hevði verið stoltur av soninum í dag.

Hini nýggju landsstýrisfólkini eru eisini spent at bróta upp um armar, og Annika Olsen fer til arbeiðis við góðum treysti.

Nýtt øki hjá Innlendismálaráðnum er Landsverk, men onnur mál eru kommunumál, umhvørvi, orka og samferðsla fyri at nevna nøkur øki.

Jacob Vestergaard fer niðan í Fiski- og tilfeingismálaráðið, og tað er ein sessur, hann hevur roynt áður. Og har er traditionelt nógv at tríva í, so hann fer avgjørt ikki at keða seg.

Johan Dahl hevur verið landsstýrismaður »for en kort bemærkning«, meðan bæði Rósa Samuelsen og Kaj Leo Johannesen er púra nýggj í landsstýrishøpi. Kaj Leo Johannesen er triðji løgmaðurin, sum tekur við uttan at hava landsstýrisroyndir framman undan. Hinir báðir eru Pauli Ellefsen og Edmund Joensen, báðir úr Sambandsflokkinum.



*Tá tingfólk verða vald í landsstýrið, taka varafólk við. Her er nýggi vinnumálaráðharrin, Johan Dahl, saman við varamanni sínum, Jaspuri Vang*



*Fráfarandi løgmaður, Jóannes Eidesgaard, ynskir nývalda løgmanninum, Kaj Leo Johannesen, tillukku við starvinum*